Tjaldur-StÍF 26-29 (12-10):

# Bronsan er vís



*Innan eitt korter í seinna hálvleki avgjørdu strandingar dystin móti Tjaldri, og nú hava teir í øllum førum tryggjað sær bronsuna*

**Strandingar sópaðu seinasta ivan av vegnum, tá teir vunnu útidystin móti Tjaldri, og nú er bronsan so komin til høldar**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Tað hevur ligið í luftini seinastu nógvu vikurnar, og nú varð tað so staðfest. StÍF tekur sær av bronsumerkjunum, og harvið er mest sum alt puslispælið í bestu mansdeildini lagt. Eisini hóast VÍF enn ikki hevur tryggjað sær meistaraheitið.

### Nýttu eitt korter

Sunnudagin vitjaðu strandingar hinumegin fjørðin, og hóast talan var um ein spennandi dyst, so endaði alt við, at gestirnir gjørdu bart.

Leingi var annars líkt til, at Tjaldur veruliga ætlaði sær at gera nakað við grannarnar hesaferð. Í fyrra hálvleiki var heimaliðið omaná, men alt koppaði á høvdið miðskeiðis í seinna hálvleiki.

Tjaldur var tá á odda við einum tveimum málum, men innan eitt lítið korter var munurin brádliga átta hinvegin. At Tjaldur so fekk minkað nakað um munin móti endanum, komst einamest av, at strandingarnir nú tóku sær av løttum.

### Bronsan vís

Sum sagt, so tryggjaðu strandingar sær í øllum førum bronsuna sunnudagin, men hóast nógv enn kann henda á pappírinum, so verður tað neyvan til meira enn tað sama. Enn kunnu strandingar røkka Neistanum og enn kann Neistin røkka vestmenningum, men tað hendir neyvan so nógv seinastu dystirnar, at raðfylgjan verður nakað broytt í oddinum.

Tað kann hon hinvegin gera í niðaru hálvu. Ikki minst man tað hava sálarligan týdning í Runavíkini, um teir megna at vinna seg upp á eitt søguliga høgt fjórða pláss, og ivaleyst verður tað hetta, sum meddað verður eftir seinastu dystirnar á árinum.

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-StÍF 26-29 (12-10)**
Málskjúttar:
Tjaldur: Sverri Justinussen 8, Mortan Hansen 7(2), Zoran Sarcevic 5, Dragia Stojovic 5, Dan Thorleifsson 1
StÍF: Marius Joensen 8, Artur Johansen 5, Sveinur Justinussen 5(3), Alexandur Johansen 3, Jón Rasmussen 3, Bent Djurhuus 2, Costin Dumitrescu 1, Anfinnur Joensen 1, Andre F. Danielsen 1

Kyndil-H71 25-24(11-14):

# Kyndil betur enn hoyvíkin



*Tað var fyrst og fremst stríðsviljin, sum gjørdi, at Kyndil aftur hesa ferð dróg longra stráið móti grannunum úr Hoyvík*

**Kyndil fekk fjórða sigurin í endaspælinum, tá teir fyri aðru ferð í ár bastu H71, sum framvegis er sigursleyst í endaspælinum**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Grannauppgerð var í Høllini á Hálsi, tá Kyndil og H71 hittust sunnudagin.

Sum vera man, so var talan um ein opnan dyst, sum slíkar uppgerðir altíð eru, men tað var tó ikki sørt, at Kyndil mátti metast sum favorittur. Bæði tí at teir eftir sera laka grundspælið tykjast hava fingið glið á sítt spæl, og so eisini tí at hoyvíkingar so fullkomuliga eru uppsteðgaðir, eftir at teir annars tóktust ætla sær bronsuna í grundspælinum.

### Viljin avgerandi

At huguin hjá hoyvíkingum at spæla hondbólt er viknaður, sást eisini á tunna hópinum, sum var til dystin sunnudagin. Tveir málverjar og sjey útileikarar var alt tað, sum H71 kundi mynstra við, og hetta var heldur ikki nóg mikið til at tryggja teimum sigurin á Kyndli.

Tað var annars um reppið, at so varð, tí stórsta partin av dystinum vóru tað hoyvíkingarnir, sum høvdu munin. Ikki bara á máltalvuni, men í longum løtum eisini á vøllinum, har Johan Danielsen í Kyndils-málinum tó var tann forðingin, sum so ofta var teimum fyri.

Er tað nakað, sum hevur eyðkent Kyndil í ár, so er tað stríðsviljin, og so var eisini hesaferð. Hóast hoyvíkingar kanska høvdu betra spælið, so góvust teir grønu ongan tíð við at stríðast, og um miðjan seinna hálvleik gav hetta veruliga at bíta. Kanska vóru hoyvíkingarnir eisini møddir, tá teir eftir eitt reytt kort ikki høvdu møguleika at fremja nakrar útskiftingar. Dysturin gjørdist nú alsamt tættari, og veruligt lív kom í fámentu fjøldina, tá Kyndil bert fimm minuttir fyri leiklok legði seg á odda. Hoyvíkingarnir roynd u at svara aftur, men til fánýtis, og einasta, sum teir fingu burtur úr seinastu royndunum, var enn eitt reytt kort, so nú noyðist framman undan tunni hópurin at vera bæði Hans J. Jacobsen og Olaf Vestergaard fyri uttan, tá teir hitta Tjaldur í næsta dystinum.

### Afturhvarv

Sum vit longu hava sagt nakrar ferðir, so eru hoyvíkingarnir fullkomuliga uppsteðgaðir í endaspælinum. Stríðsviljin og spæligleðin frá grundspælinum tykist vera fullkomuliga horvin, og einasta mál teirra tykist nú vera at fáa fremsta málskjúttan í kappingini annað árið á rað.

Hjá Kyndli er hinvegin øðrvísi statt. Eftir eitt metvánaligt grundspæl, hevur liðið veruliga reist seg, og tó at talan í stóran mun er um ungar leikarar, so skerst ikki burtur, at Bárur Johannesen hevur átt stóran lut í hesum. Spurningurin er so bara, hvussu leingi Kyndil sleppur at hava hann í liðnum, áðrenn fótbólturin ger tað neyðugt at gevast við hondbóltinum.

At enda skal so skoytast uppí, at í øllum førum fyri ein leikara var dysturin sunnudagin nakað serligt. Petur Martin Johansen gjørdist í 1982 leikandi venjari hjá KÍF. Áðrenn hetta spældi hann annars við Kyndli, men flestum kunnugt, so hevur hondbólturin líka síðani gingið fyri seg í Kollafirði.

Nú er havnarmaðurin í Kollafirði fluttur aftur til Havnar. Eisini á vøllinum, tí sunnudagin kundi hann fyri fyrstu ferð í 20 ár spæla 1. deildarhondbólt við Kyndli. Kanska er talan bara um eitt sindur av nostalgi ella afturhvarvi, men tað man undir øllum umstøðum kennast hugaligt hjá Peturi Martini, at hann soleiðis sleppur at enda hondbóltsleið sína í barndómsfelagnum.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-H71 25-274 (11-14)**
Málskjúttar:
Kyndil: Bárður Johannesen 10(2), Janus Einar Sørensen 4, Jónleif Sólsker 3, Ken Zachariasen 3, Høgni Klein 2, Regin Johannesen 2, Hans Andreas Dahl 1
H71: Bjarni Wardum 7(2), Halgir Dahl Olesen 6, Kristjan Petursson 4, Olaf Vestergaard 4, Finnur Hansson 2, Hans J. Jacobsen 1
Brotskøst: Kyndil 2, H71 2
Útvísingar: Kyndil 1, H71 5
Diskvalifikatiónir: H71 2 (Í báðum førum beinleiðis reytt)
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Páll Nólsoy.



# Enn eitt tepurt tap

Hóast venjaraskifti, so gongur framvegis striltið hjá Julian og teimum í Hull City.

Um vikuskiftið spældu teir á útivølli móti Swansea, og sum tað so ofta er hent í seinastuni, so gjørdist talan enn einaferð um eitt tepurt tap. Tað var nevnliga Swansea, sum í 84. minuttir skeyt einasta málið í dystinum, so hóast leikararnir hjá Hull roynd u at stríðast fyri nýggja venjaranum, so gav hetta einki úrslit.

Á heimasíðuni hjá Hull verður sagt, at hóast glottar vóru at síggja á liðnum, so er spælið framvegis alt ov tannleyst, og at um spælararnir ikki taka annað skinn um bak heilt skjótt, so dettur liðið eisini burtur úr sonevnda play-off plássinum, sum teir í løtuni eru á.

Eftir at hann seinasta vikuskiftið var á beinkinum, spældi Julian Johnsson hesa ferð allar 90 minuttirnar fyri Hull, men eins og hjá liðfeløgunum, so var talan ikki um tað góða spælið frá føroyinginum, hóast stríðsviljin sum vant var í topp.

**- jm**

# Súni skaddur



*Súni Olsen fekk bert 15 minuttir á vøllinum, tá hann fríggjadagin slapp at byrja inni fyri FC Zwolle*

**Fyrst óttaðust læknarnir ein álvarsligan knæskaða, men tíbetur sær tað nú heldur betri út hjá unga gøtumanninum**

HOLLAND
*Jákup Mørk*

Eftir at hann í langa tíð hevur verið fastur partur av hópinum hjá Zwolle, og eftir at ein sjúkralega annars hevði sett venjingarstøðuna nakað aftur, var Súni Olsen millum teir fyrstu 11 á vøllinum, tá Zwolle fríggjadagin vitjaði Cambuur.

Fyri Súna mundi hetta kennast sum ein álitisváttan frá venjaranum, og tess størri mundi smeiturin eisini vera, tá gøtumaðurin noyddist skaddur av vøllinum eftir bert 15 minuttir.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á Súna, men sum skilst, so óttaðust læknarnir í fyrsta umfari fyri, at talan var um ein álvarsligan knæskaða, sum noyddi hann av vøllinum, men kanningar leygardagin vístu tó, at hetta neyvan er somikið álvarsligt. Tó nóg mikið til, at í hvussu so er fyrsta vikan verður uttan venjing fyri hansara viðkomandi.

Sjálvur dysturin endaði annars við javnleiki 1-1, og harvið misti Zwolle eitt lítið fet í stríðnum um at vinna Excelsoir á fyrsta plássinum aftur. Zwolle var annars á odda 1-0, men við einum máli beint fyri hálvleik eydnaðist heimaliðnum at javna til endaliga úrslitið.

Hóst hetta sum nevnt kostaði eitt fet í oddinum, so er ikki sørt av bjartskygni í Zwolle í løtuni. Triði fjórðingurin av kappingini er júst farin aftur um bak, og her var Zwolle besta liðið. Í Hollandi er tað soleiðis, at fýra sonevndir perioduvinnarar tryggja sær atgongd til endaspæl um sess í bestu deildini, so í øllum førum hevur Zwolle tryggjað sær hendan møguleikan, og heldur góða gongdin, sum hevur sermerkt liðið síðani vetrarsteðgin, fram, er als ikki óhugsandi, at tað fer at eydnast at vinna seg upp á fyrsta plássið.

Ein góð ábending um hetta fæst helst komandi vikurnar, tí eftir at Zwolle fyrst hevur heimadyst móti Haarlem, eru komandi dystirnir úti móti Den Haag og heima móti Roosendaal, og hesi bæði er lið, sum eru við í oddastríðnum í næstbestu hollendsku deildini.

# Talvstøður

## 1. Deild

**KT KTF 2.5-1.5**
Hans K. Simonsen (2070) - Ólavur Simonsen (2215) 0,5-0,5
Bernhard Thomsen (1980) - Rani Nolsøe (2185) 1-0
Eyðálvur Johannesen (1680) - Tummas M. Antoniussen (1965) 0,5-0,5
Alvin Joensen (1640) - Finnbjørn Vang (1965) 0,5-0,5

**VT HT 3-1**
John Rødgaard (2315) - Carl Eli N. Samuelsen (2105) 1-0
Torbjørn Thomsen (2210) - Martin Poulsen (2090) 0,5-0,5
John Jacobsen (1910) - Olaf Berg (2055) 1-0
Kári Durhuus (1745) - Herluf Hansen (2035) 0,5-0,5

**TFS HT2 3-1**
Martin Brekká (2060) - Jóhan Gaard (1810) 1-0
Finnbjørn Zachariasen (2050) - Óli Joensen (1790) 1-0
Sámal Christiansen (1800) - Jóhan E. Hansen (1760) 0-1
Gunnar Joensen (1790) - Jákup D. Joensen (1625) 1-0

**Støðan eftir 10. umfar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | KTF, Klaksvík | (5-4-1) | 26,0 |
| 1 | VT, Vestmanna | (6-2-2) | 26,0 |
| 3 | HT, Tórshavn | (4-5-1) | 22,5 |
| 4 | KT, Kollafjørður | (3-3-4) | 17,5 |
| 5 | TFS, Hvalvík | (3-2-5) | 17,5 |
| 6 | HT 2, Tórshavn | (0-2-8) | 10,5 |

## 2. Deild

**TT RT 3-1**
Jens Kristian Hansen (2165) - Bjarki Ziska (1805) 1-0
Helgi Joensen (1740) - Rúni Jacobsen (1725) 1-0
Wensil Højgaard (1730) - Brandur K. Jacobsen (1655) 0,5-0,5
Justines Hansen (1650) - Henrik W. Joensen (1655) 0,5-0,5

**ST KTF 2 2-2**
Torkil Nielsen (2080) - Ingolf Gaard (1745) 1-0
Bernhard Augustinussen (1835) - Rúni Dragaberg (1705) 0,5-0,5
Jónfinn Thomsen (1795) - Esbern Christiansen (1610) 0-1
Heri Christoffersen (1600) - Rani Tómasson (1185) 0,5-0,5

**GT VT 2 1-3**
John Joensen (1750) - Dánjal P. Højgaard (1810) 0,5-0,5
Jákup F. Joensen (1715) - Jákup á R. Andreasen (1655) 0-1
Reinhold Isaksen (1710) - Jákup Durhuus (1620) 0,5-0,5
Heri Thomsen (1375) - Joen Pauli Johannesen (1465) 0-1

**Støðan eftir 10. umfar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | TT, Toftir | (9-0-1) | 28,0 |
| 2 | ST, Sandavágur | (5-2-3) | 23,0 |
| 3 | RT, Runavík | (2-4-4) | 20,0 |
| 4 | KTF 2, Klaksvík | (4-1-5) | 18,5 |
| 6 | VT 2, Vestmanna | (3-2-5) | 15,0 |
| 5 | GT, Gøta | (2-1-7) | 14,5 |

## 3. Deild

HT 3 VT 3 4-0
Súni Ziska (1760) - Ingolf Debes (1345) 1-0
Súni Jacobsen (1685) - Rógvi Hansen (1075) 1-0
Jón M. Andreasen (1610) - Bárður Joensen 1-0
Ronny í Lon (1440) - Martin Jóanesarson 1-0

**HT 4 ST 2 3-1**
Poul Poulsen (1720) -Magni Thomassen (1495) 1-0
Hans B. Højgaard (1660) - Jóannes Ortind 1-0
Jóannes Guttesen (1585) - Dánjal Hararldsen 0-1
Herluf Mortensen (1325) - Rani Nielsen 1-0

**Støðan eftir 10. umfar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | HT 3, Tórshavn | (7-1-0) | 26,0 |
| 2 | HT 4, Tórshavn | (5-0-3) | 20,0 |
| 3 | ST 2, Sandavágur | (4-1-3) | 17,0 |
| 4 | Rókur, Oyri | (3-0-5) | 10,5 |
| 5 | VT 3, Vestmanna | (2-1-5) | 6,5 |

## Talvið hesa vikuna

**Kasparov,G (2838) - Vallejo Pons,F (2629)**
**Linares SuperGM, 03.03.2002**

Meginparturin av heimselituni er samlaður í hesum døgum í Linares, Spania. Linares er ein sera siðvand kapping, oftani kallað "The Wimbledon of Chess". Garry Kasparov er ikki óvæntað á odda eftir sjey umførum, við 4,5 stigum (Vunnið tvey og fimm javnleikir), meðan Anand, Ivanchuk og Ponomariov hava 3,5 stig. Tólv umfør skulu telvast.

1.e4 c5 2.Rif3 e6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 a6 5.c4 Rif6 6.Ric3 Fc7 7.a3 b6 8.Be3 Bb7 9.f3 Nc6 10.Be2 Rb8 11.b4 Be7 12.0-0 0-0 13.Rc1 Rie5 14.f4 Rig6 15.Bd3 Ba8 16.Fe2 Kh8 17.e5 Rig8 18.Fh5 a5 19.Ridb5 Fc6 20.Rc2 axb4 21.axb4 Bxb4 22.Rie4 f5 23.Rig5 Rih6 24.Kh1 Bc5 25.Bc1 Fc8 26.h3 Kg8 27.Kh2 Rie7 28.Rid6 Bxd6 29.exd6 Ric6 30.Bb2 Rib4 31.Rd2 b5 32.Rc1 Fe8 33.Fe2 Rixd3 34.Rxd3 Rif7 35.Rg3 Rixg5 36.Rxg5 Rf7 37.Fe5 Ff8 38.cxb5 h6 39.Rg3 Kh7 40.Bd4 Bd5 41.b6 Rf6 42.Rcc3 Rf7 43.Rc7 Be4 44.Rb3 Bd5 45.Rb5 Bb7 46.Ra5 Fd8 47.Ra7 Be4



48.Fxe6! Fh4 (dxe6 49. Rxf7 sum vinnur) 49.Fxf7 Fxf4+ 50.Kg1 1-0
áðrenn 48.Fxe6!